# TILTØK

**Gudstænastur**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Bergur D. Joensen
***Kollafjørður:*** kl. 11.00, Mogens Tilsted Christensen
***Sandavágur:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen.
***Komandi sunnudag, 23. apríl verður farið í kirkju kl. 11.00 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø***
***Norðskála kirkja:*** kl. 12.00, Jógvan Fríðriksson
***Funningur:*** kl. 11.00, Konfirmatión, Emil Olsen
***Gøta:*** kl. 11.00, Konfirmatión, Martin R. Jacobsen.
***Frá hesum sunnudegi verður alla summarhálvuna farið í kirkju kl. 11.00 í Gøtu***
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, Deyvagudstænasta, altarg.
***Talvan gongur fyri deyvameinigheitina, Jónsvein Bech***

**Funningur**
Mikukvøldið kl. 19.30 sjey-lestra gudstænasta, konfirmantar og Emil Olsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15.00 Bøn. Streingjamusikkurin luttekur á møti í Katólsku kirkjuni kl. 19.30.
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið - fyri allar kvinnur.

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 19.00 Sangvenjing, Gospel Hearts - venja í Hebron á Argjum.
Kl. 20.00 Sangvenjing, Ebenezerkórið - venja í Hebron á Argjum.
Mikudag kl. 17.00 Sangvenjing, Eldra barnakórið, »Kassia«. Kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - talari: Rólant í Skorini, evni: Jesus og ápostlarnir.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - talari: Jens Wang, evni: Hvat lærir Bíblian um homoseksualitet. Kl. 20.00 Kvinnumøti - talari: Birgit á Lofti.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.

**Missiónshúsið v/Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.

**Meinigheitshúsið**
Meinigheitslegan verður 5.-7. mai og seinasta freist at tekna seg er 30. apríl.
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, Matt. 10, 1-25.
Mikudagin kl. 19.00 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Vagn Foldbo og Leo Hans Mikkelsen frá Heimamissiónini, har ársgávan verður innsavnað. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími og bønarløta. Filmur verður vístur um seinastu 18 tímarnar í lívi Jesusar.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 12.00, Møti. Páll Poulsen talar. Evnið: 2. Móseb. Samandráttur og endi. Kl. 18.00 Sangmøti við kvartettini í Betesda.
Mánadagin 24. apríl kl. 19.00, BeTwix. Tiltak fyri ung í aldrinum 5.-8. flokk. www.hebron.fo

**Lívdin**
*á Brekku 3*
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
*Í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Símun Absalonsen talar um evnið: »Ivandi Tummas«. Kl. 11.30 Samfelagsløta við drekka. Kl. 12.00 Tilbiðjunarmøti har Jógvan Z. talar um »Sannleikar úr Rómbrævinum«. Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin er kl. 12.00.
Týskvøldið kl. 20.00 Møti á Brekku 3.
www.livdin.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga Sangkórið venur.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdið hjá Hera Joensen.
Mikudagin kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið møtir. Ung frá 13 ár og uppeftir eru vælkomin við.
Mikudagin kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdið hjá Sonju Klein.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikukvøldið kl. 19.30 Felags gudstænasta í Katólsku kirkjuni.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við Sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. www.gospel.fo

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Vikuksiftismøtir verða leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00. Luttøka ymsastaðni frá. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20.00 Húsmøti hjá Annu og Odmar Hansen.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangel. møti.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikudagin kl. 17.30 Tim5.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 17.00 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mikumorgun og fríggjamorgun kl. 6-7 Bøn.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Ólavur Jøkladal talar. Evni: Filipsoyggjar I: Tá ið teir sóu Hann.
Ólavur talar eisini sunnukvøldið kl. 18.00. Evni: Filipsoyggjar II: Eygu míni hava sæð kongin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Kvinnumøti, André Matras talar, evni: Eg skal geva tykkum hvílu! (Matt. 11:28).
Sunnudagin kl. 14.00 er Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími.

**Ítróttarhøllin í Vági**
Møtir verða hesar dagar.
Týskvøldið 18. apríl kl. 20.00 í høllini.
Mikukvøldið 19. apríl kl. 20.00 í høllini.
Talarar: Wilson Goeda frá Suðurafrika. Eivind Frøen frá Noregi.
Sangluttøka: Kórið úr Sumba. Streingjakórið úr Porkeri. Innsavnan verður mikukvøldið. Øll eru hjartaliga vælkomin til møtini.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdagin kl. 17.00 Barnakórið øvar.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. Finnbogi Olsen talar. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 20.00 Guitarskúli fyri 12 ár og eldri.
Týsdagin kl. 20.00 Streingjakórið øvar.
Mikudagin kl. 20.00 Heimaforbunsmøti.

**Ørkin, Reykjavík**
Möti hvört sunnukvöld kl. 20.30.

**Evangel. fundur í Esbjerg Samkoman Malta**
Fríggjakvøldið 21. apríl kl. 19.30 verður evangel. fundur í Sædding Center, Sædding, Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19.00 Evangel. fundur í Skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17.00 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit ein góðan drekkamunn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur:
tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 17. apríl***
2. páskadagur - stong.
***Týsdagin 18. apríl***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 Frásøgn úr Venezuela - Erla og Ingvard Petersen.
***Mikudagin 19. apríl***
kl. 10-12.00 Handverk. Vegleiðing er á staðnum.
kl. 13.00 Vitja Færøernes Kommando í Mjørkadali - Søren Skinderholm.
Tilm. 316491.
***Hósdagin 20. apríl***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Telduprát - Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14.00-17.00 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
***Fríggjadagin 21. apríl***
kl. 12.00-17.00 Opið hús. Sunnudagin 23. apríl verður gingið gjøgnum undirsjóartunnilsgongdina til Klaksvíkar úr Tilhaldinum kl. 12.30. Byrjað verður úr Leirvík kl. 14.00 og vit verða aftur í Leirvík kl. 18.00.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Páskafrí. Vit byrja aftur týsdagin 18. apríl.***

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Tilhaldið á Toftum**
*tlf. 448690*
*er opið frá mánadag-fríggjadag, kl 14.00-18.00.*
*Drekkamunnur v/ smákøkum kostnaður 5 kr.*
*Miku- og hósdag er felags kaffiborð, kostnaður 10,- kr.*

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

**Dagtilhaldið á Strondum**
***verður opið týsdag og hósdag kl. 15.00-18.00.***

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
soljan@klaksvik.fo
soljan@post.olivant.fo
***Mánadagin***
kl. 14.00 Fimleikur
kl. 14.00 Tunnusláttur - ***tilm. til týsdagsdøgurðan áðrenn kl. 17.00 á tlf. 459091***
***Týsdagin***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 Bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl. 12.00 Døgurði
***Mikudagin***
kl. 13.30 Telda
***Hósdagin***
kl. 10.00 Fimleikur
kl. 11.00 Telda
kl. 13.30 Bløðini verða lisin fyri sjónveikum.

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, kánus, o.m.a. Bløðini eru altíð til taks. Hvønn dag enda vit við andakt og sangi.*
**Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið Sóljuna**

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ítriv: silvurarbeiði og annað
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00
Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20. Sunnudag kl. 17.00. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. mai kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Jastrid Andreasen, Klaksvík og Oddmar Niclasen, Froðba. Døgurðin verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 17.30. Vælkomst verður í Skálanum frá kl. 22.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 30. apríl á tlf. 457002 ella 268751.

Leygardagin 6. mai kl. 15.00 giftast í Leirvíkar kirkju, Saloma Jóhannesen, Leirvík og Rúni Petersen, Fuglafjørður. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 29. apríl á tlf. 227257 ella 443210. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.

Leygardagin 13. mai kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Maibritt Trondesen og Hjalmar Ingebrigtsen, Válur. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 30. apríl á tlf. 424751, 223991 ella 21551.

Leygardagin 10. juni kl. 14.00 giftast í Betania í Porkeri, Sigrid í Skemmuni, Porkeri og Gimme Andreassen, Vágur. Veitslan verður í skúlanum í Porkeri kl. 18.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. mai á tlf. 373759/373287.

1. Juli giftast í Miðvágs kirkju Laila Nattestad og Kári Jacobsen, Miðvágur. Vígslan verður kl. 16.00 og veitslan verður í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá, áðrenn 12. juni á tlf. 333346, 220296, 332538, 332302.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 21. apríl kunnu hjúnini Alberta og Bill Mc. Leod í Klaksvík halda gullbrúdleyp. Tey, sum ynskja at gleða brúðarparið eru vælkomin í heimið hjá dóttrini, Undir Fossum 37, frá kl. 16.00.

**90 ár**
Í dag, 18. apríl verður Bertina Johansen, Sandavágur 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Bertinu, eru vælkomin til sonin Kjartan týsdagin kl. 18.00.